# Johannes C. Michelsen
# – Lill – farin

Sunnudagin 16. mars doyði Johannes C. Michelsen, 89 ára gamal.

Lill, sum vit vanliga róptu hann, var av Dalólastovu-fólkunum frá faðirssíðu og úr móðurætt úr Funningsstovu. Foreldur hansara, Hilda í Funningsstovu og Johannes í Dalólastovu, vóru bæði, sum skilst, av havnarætt. Tað er kanska ikki ov nógv at nevna, at hetta hevur ikki ongan týdning, tá talað verður um ættarfólk.

Tey vóru trý systkin, umframt Lill vóru tey Petur Michelsen, byggimeistari, sum var giftur Bette úr Øravík og áttu tey sonin, Eirik. Systir Lill var Hanna, ið var gift við Igolf Olsen, sum í nógv ár var radiomekanikari hjá Vellejus. Hanna og Ingolf áttu børnini Finn, Hans Jørgen og Hildur.

Vit sum minnast foreldur hansara hava bert havt gott at bera teimum, og hjá vanligum havnarfólki, eru tey, Funningsstovufólkini og Dalólastovufólkini, kend fólk.

Lill hevur tikið lut í nógvum felagsarbeiði – ella vit kunnu siga tað eisini á tann hátt, at ungdómurin í hansara tíð hevði eitt rættuliga gott samanhald, tey kendu ikki bara hvønn annan, men tey høvdu nógv til felags, bæði í ítrótti o. ø. Lill kom skjótt upp í ymiskar felagsskapir. Hann var avhaldsmaður og var tað alt sítt lív, kom tíðliga – um fermingaraldur – upp í Havnar Avhaldsfelag, har hann var rættuliga virkin, tí tað hevur altið verið futtur í honum. Tað sum hann serliga tók sær av í felagslívinum var, tá okkurt praktiskt skuldi fáast frá hondini. Har ikki at gloyma hansara stak evni at fáa neyðugvar uppgávur frá hondini.



Tað gamla Avhaldsfelagið hevði eini stór felagshús í tí vit kalla Avhaldsbrekkuni, beint yvir av Gamla Bókhandli, nú partur av Hotel Hafnia. Har var hann ein týðandi stuðul, nevndarlimur og ein av teimum, sum altíð var til taks, tá ein i hond skuldi takast í.

Tað er nokk tað vit kunnu siga um Lill í so nógvum, tí hann er ein av teimum trúgvu losjulimunum og ikki minst har hevur hann tikið hond í at fáa felagsbygingin fyri ein stóran part til tað, sum hann er í dag – ein hugnaligur og vælegnaður, sum framvegis karmur um virksemið hjá Losjuni í Havn.

Á yngru árum var Lill sjálvsagt sera virkin í ymiskum felagsvirksemi, ungdómsvirksemi o. s. fr. Teir vóru nógvar útferðir, fundir kring í landinum, sum savnaði eina rúgvu av fólki.

So er ikki at gloyma fótbóltsfelagið B36 – har var hann ein av stovnarunum, og tær røturnar til fótbóltin gjøgnum B36 vóru altíð dýrabærar hjá honum.

Vit sum ikki hava júst hasi evnini at at blæsa okkum upp um fótbólt, vóru sjálvsagt ikki so heilt interessant, tá tað snúði seg um at tosa við um leikin á fótbóltsvølli.

Í ungu árunum var stórt felagsvirksemi, serliga í Losjuni. Tað var ungmannadeildin, sum tá var tað stóra trekkplástrið, og har kom nógvur ungdómur. Alt summarið vóru nógvar útferðir og tiltøk, og sjónleikir vórðu nógvir førdir fram í Havn tá. Ungmannadeildin hevði nógv ár eftir krígslok fleiri sjónleikir á palli í sjónleikarhúsinum, og har var Lill ein av leikarunum. Í Tempulriddara Ordaninum var Lill eisini ein av ídnastu stuðlunum.

Lill varð útbúgvin rørleggjari. Hann var nógv ár hjá Mariu Poulsen. Hann fór síðani undir egið virki, Demich, sum helt til uppi á Tinghúsvegnum. Seinni høvdu teir eisini handil í niðaru hædd í Losjubygninginum.

Lill var býráðslimur í sekstiárunum, har hann umboðaði Sambandsflokkin. Var m. a. formaður í teknisku nevnd. Lill var giftur Fíu, dóttir Lenu og Sámal Debes á Tinghúsvegnuum í Havn. Lena var ættað úr Funningi, Sámal var havnarmaður. Fía doyði í 1996.

jl

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ebba Petersen** andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin, 93 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapelinum mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin klokkan 15.

**Jóhannes C. Michelsen**, vanliga nevndur **Lill**, andaðist á Landssjúkrahúsinum pálmasunnudag, 89 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum langafríggjadag 21. mars kl. 15.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá okkara kæra mamma, vermamma, omma
og langomma

**Frida Katrina Hansen**
(Trina)
í Árnafirði

andaðist og fór til gravar.
Tøkk til starvsfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Tøkk til prestar, kirkjutænarar, sangarar, berarar
og tykkum, sum bakaðu og hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri kransar, blómur og gávur til Árnafjarðar
kirkju, og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til
hennara seinasta hvíldarstað.

Gleðiligar páskir, øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Oddbjørg og Esmar**

**Dagurin**

**20. mars. Pálmasunnudagur** og dymbildagavikan byrjar. Gordius, deyður umleið 300. Rómverskur hermaður, sum gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

**21. mars. Várjavndøgur.** Tvær ferðir um árið eru sólin og jørðin staddar soleiðis hvør móti aðrari, at dagur og nátt eru líka long.

**22. mars. Páll biskupur**, deyður umleið ár 250. Talan er ikki um ápostulin, men um ein biskup í Narbonne í Fraklandi við sama navni. Er eitt av teimum fyrstu dømunum um ein biskup, sum ikki doyði blóðvitnisdeyðan.

**23. mars. Fidelis**. Sigst at vera halgimenni, sum varð tikið av døgum í Afriku í 5. øld, men annars vita teir einki um hann. Fidelis merkir tann trúfasti. Rasmus Effersøe doyði hendan dagin í 1916.

**24. mars. Ulrika**. Teir vita ikki, hvønn hetta halginavnið sipar til. Týska navnið Ulrikus kemur av uodal, ið er sama orð sum óðal, rikus merkir eyður.

**25. mars. Mariumessa um várið.** Til minnis um, at eingilin Gabriel boðaði Mariu Moy frá, at hon skuldi bera frelsaran í heim (Lukas 1, 26-38). Grikska navnið navnið Maria er tað sama sum hebráiska Mirjam, týdningurin er ókendur. Venceslaus Ulricus Hammershaimb varð føddur hendan dagin í 1819.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan
hátt sýndu samkenslu og stórt hjálpsemi, tá kæra
mamma, vermamma, omma og systir okkara

**Ragnhild Poulsen**
Skipanes

varð sjúk, doyði og varð jarðað.
Takk fyri góð orð í heimi og kirkju.
Takk fyri blómur og kransar og takk øll tit, sum
luttóku við jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Dánial og Kára**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri
pápi okkara

**Martin Heinesen**

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til tykkum á Klaksvíkar sjúkrahúsi, ið vóru so
væl um hann síðstu tíðina.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, berarar og sangarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Christianskirkjuna.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Asbjørn og Henny**

